

## Almannastovna søkir eftir

# fíggjar- og fyrisitingarfólki

**Stuðulsskipanin fyri børn, er skipan á Almannastovuni, sum veitir stuðul til heimabúgvandi børn og ung, ið bera brek. Stuðulsskipanin fevnir um alt landið. Í skipanini starvast í løtuni uml. 100 fólk. Játtanin fyri 2006 er slakar 17 mió. kr.**

**Á Almannastovuni virka vit miðvíst fyri at lúka krøvini frá politiska myndugleikanum og viðskiftafólkunum. Dentur verður lagdur á høgt tænastustøði, rættartrygdina og virðingina fyri einstaklinginum, eins og virkað verður fyri áhaldandi at menna førleikan, trivnaðin og samstarvið á stovninum.**

Til stuðulsskipanina fyri børn á Almannastovuni verður søkt eftir fyrisitingarfólki.

Vit sóknast eftir einum fólki við viðkomandi útbúgving og royndum. Stuðulsskipanin er ein nýggj skipan, og tú kemur at fáa ein virknan leiklut at byggja upp mannagongdir og at laga fyrisitingarligu amboðini til.

Starvið umfatar í høvuðsheitinum bókhald og avgreiðslu av lønum og setanarbrøvum hjá starvsfólki í stuðulsskipanini, umframt annað vanligt skrivstovuhald. Eisini kemur tú at hava nógv samskifti við stuðulsfólk og foreldur at børnum við breki.

Tað er tí ein treyt, at tú ert virkin og fyrikomandi, hevur sera góðan telduførleika, góð samstarvsevni og arbeiðir sjálvstøðugt.

Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Fleiri upplýsningar um starvið fáast við at venda sær til Oyvind av Skarði, deildarleiðara á telefon 35 35 10.

Skrivlig umsókn skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 27. februar 2006, kl. 9.00.

Send umsóknina til:
Stuðulsskipanin fyri børn
Almannastovan
Smyrilsvegur 20
Postboks 3096
110 Tórshavn.

KREA.FO - TEL 47 80 80

almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo



# Livandi og kundavinaligur samskipari

Søkt verður eftir samskipara til Marknaðardeildina.

Høvuðsuppgávan hjá samskiparanum er skipa fyri átøkum og saman við hinum starvsfólkunum á marknaðardeildini at skapa eitt livandi og kundavinaligt umhvørvi fyri kundar og starvsfólk í Sparikassanum. Á Marknaðardeildini skipa vit arbeiðið í verkætlanir, og tann ið verður sett/ur, fær ábyrgd av einstøkum verkætlanum og kemur at taka lut í øðrum. Uppgávurnar eru fjølbroyttar og fevna um ymisk marknaðarátøk, samskifti, at skipa fyri kundatiltøkum og aðrar ad hoc-uppgávur.

Vit leita eftir einum fólki, har leiðin frá hugskoti til veruleika er stutt. Tú dugur væl at tosa við fólk, og samstundis liggur tað væl fyri hjá tær at skriva. Tú hevur árræði og sært møguleikar heldur enn forðingar. Vit vænta, at tú skrivar føroyskt, danskt og enskt til lítar. Tú dugur at strukturera arbeiðið og kanst arbeiða sjálvstøðugt og inninga í tvørfaklig toymi.

Visjónin hjá Føroya Sparikassa er at vera brúkaravinaligasti peningastovnur í Føroyum, og tað ynskja vit skal síggjast aftur í samskiftinum við kundar okkara og miðlar.

Tú hevur útbúgving innan marknaðarføring, búskap, samskifti ella líknandi og hevur lætt við at seta teg inn í nýggj fakøki.

Í løtuni starvast 6 fólk á marknaðardeildini. Arbeiðsøkið fevnir um marknaðarføring, design og samskifti. Arbeiðshátturin er merktur av tøttum samstarvi, og at øll eru til reiðar at taka eina hond í, tá á stendur.

Áhugað kunnu seta seg í samband við Ólav Jensen, sølu- og marknaðarleiðara, á tel. 348540 ella á e-mail olavur.jensen@sparikassin.fo ella við Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðara, á tel. 348510 ella á e-mail marjun.eystberg@sparikassin.fo.

Starvið verður sett skjótast gjørligt. Lønin verður ásett eftir avtalu.

Skrivligar umsóknir skulu vera starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi fríggjadagin tann 24. februar 2006.

Send umsóknina til:
FØROYA SPARIKASSI
Starvsfólkadeildin
Att.: Marjun Eystberg
Yviri við Strond 2
FO-100 Tórshavn

petur & petur • 320870

Visjónin hjá Føroya Sparikassa er at vera brúkaravinaligasti peningastovnur í Føroyum. Í Sparikassanum starvast 211 fólk. Á 16 privatkunda- og 2 vinnukundadeildum kring landið veita vit ráðgeving og selja fíggjarligar tænastur, har aðalvirðini eru tryggleiki og brúkaravinsemi. Á markanaðardeildini starvast 6 fólk. Í samtaki Sparikassans eru tvey dótturfeløg: Húsameklarafelagið INNI og Eik Bank.

FØROYA SPARIKASSI